# Tjaldur ver vælkomið



Skótarnir gingu skrúðgongu, meðan hornorkestrið spældi



Ditlev Róin úr Fuglafirði flutti fram røðu

**Sunnudagin var Grækarismessuhald kring meginpartin av landinum. Í Havn var, sum siður er, Grækarismessuhald á Tinghúsvøllinum**

GRÆKARISMESSA
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Kalt og eitt lítið lot var, men hetta gjørdi ikki, at fólk settust aftur. Veðrið var rættiliga gott, og longu tá tú komst oman ímóti Steinatúni fekst tú varhuga av, at her var okkurt á vási. Nógv fólk leitaðu sær oman eftir gongugøtuni. Familjur við barnavognum, pør, ung sum gomul, ja eisini onkur hissini hundurin var sloppin við oman á Vaglið har árliga Grækarismessuhaldið skuldi vera.

Á gongugøtuni seldu skótar bollar og høvdu tombola. Prátið gekk hugaliga, og fólk savnaðust á hvør síni síðu á gøtuni. Pláss skuldi jú vera fyri teimum, sum ganga skrúðgongu. Tá klokkan var farin eitt sindur av 15, hoyrdust fyrsti trummuslátturin. Bumm, bumm, bumm! Og lítla løtu seinni sást tú, hvat var á vási. Ein lang skrúðgonga, við nøkrum skótum á odda við Merkinum uppi í loft kom gangandi oman eftir gongugøtuni. Síðani kom hornorkestrið, sum spældi tónleik, og síðani aftur ein longri røð av skótum. Gulir, grønir og bláir.

Tá skrúðgongan var komin uppá pláss spældi hornorkestrið Tjaldur verð vælkomið og síðani flutti Ditlev Róin úr Fuglafirði fram røðu.

## Várið er í hondum

Eyðkenni fyri røðuna hjá Ditlevi var, at várið er í hondum:

– Sólin er farin at hækka, og er í flestu búðplássum komin upp um lægru tindarnar. Fólk munnu kenna færran av hita innanveggja, tá hon smoyggir sær inn ígjgønum gluggarnar á lágættarsíðunum. Dagarnir togna, og fuglarnir fjølgast í okkara vøkru og stórbæru náttúru, segði fuglfirðingurin millum annað.

Eisini heldur Ditlev Róin, at vit føroyingar hava eina skyldu ímóti tjóðfugli okkara. Vit eiga at syrgja fyri, at tjaldrið ikki fløkist upp í lesull og ferst á tann hátt.

– Tá tjaldrið eins og allur annar fuglur vitjar aftur regluliga og stundisliga, er tað tá okkara skylda, at taka væl ímóti og lívga um lívstreytir teirra, har vit megna.

Talan fekk eisini sín enda, og tá hon var liðug, spældi hornorkestrið fyrsta ørindi av tjóðsanginum, meðan fjøldin tók so hjartaliga undir.

Sangur og talur endaðu, og fjøldin byrjaði so smátt at spjaðast. Kuldin gjørdi, at ikki var so hugaligt at standa stillur ov leingi, men okkurt prátið hevur tú altíð stundir til. Gongugøtan tømdist, og skjótt sást ikki, at havnafólk saman við skótum høvdu fagnað tjaldrinum vælkomnum.



Skótarnir fagnaðu saman við havnafólkunum tjaldrinum á Tinghúsvøllinum sunnudagin



Eisini Effersøe hevði hug at lurta meðan røðan varð hildin



# Lítið av fólki til Grækarismessuhald



Skótarnir vóru eisini við til Grækarismessuhaldið

**Sunnudagin varð skipað fyri Grækarismessuhaldið í Klaksvík, men ikki nógv fólk vóru til staðar.**

GRÆKARISMESSA
*Ragnhild Ellingsgaard*



Rani Nolsøe, býráðslimur, helt Grækarismessurøðuna

**Klaksvík:** Veðrið var ikki av tí besta sunnudagin, tá Grækarismessuhald var hildið í skúlagarðinum í Klaksvík. Hetta var eisini uttan iva orsøkin til, at so lítið av fólki vóru til staðar.

## Skrúðgonga

Byrjað var við skrúðgongu frá Býráðshúsinum við Klaksvíkar Hornorkestur á odda. Eftir teimum fylgdu bæði skótaliðini úr Klaksvík, men heldur ikki hesi vóru so mong í tali, sum tey plaga.

Ein onnur orsøk kann eisini vera fimleikaframsýningin hjá Klaksvíkar Fimleikafelag, sum skuldi byrja lítla løtu eftir Grækarismessuhaldið.

## Flytifluglur ímyndar frælsi

Rani Nolsøe, býráðslimur, helt Grækarismessurøðuna hendan dagin.

Í røðuni tosaði hann um várið og tjaldrið, sum bæði hoyra saman. Um hvussu veturin missur takið, og ljósa varið og livandi tjaldrið koma at eyðkenna komandi tíðina.

- Óansæð, hvar vit standa í nútíðar meldrinum og hvat vit hugsa, so ynskja vit í okkara hjørtum tjaldrinum vælkomnum, segði Rani.

Eisini legði Rani í røðuni stóran dent á frælsi. Hann tosaði um Nólsoyar Páll, og um, hvat rørdist í tíðini tá á sinni.

Síðani tosaði hann um kreppuna síðst í áttatiárunum, og um, hvussu samfelagið stendur í menning í dag.

- Seinastu árini hevur føroyska fólkið bygt samfelag okkara uppaftur. Vit hava síðani kreppuna dugað betur at fiska, framleitt, selt og umsitið. Tí er støðið, vit standa á í dag, tað sunnasta og tryggasta, vit hava upplivað í okkara modernaðu tíð, segði Rani.

Rani Nolsøe endaði røðu sína soleiðis: Fyri meg ímyndar flytifuglurin frælsi. Frælsi at ferðast millum lond, at koma og fara. Tí skal mín heilsan til flytifuglin og tjaldið, tjóðfugl okkara, sum tann fyrsti at verða, at trúgva uppá frælsi !



Børnini stuttleikaðu sær í tí nógva kavanum, meðan tey vaksnu lurtaðu



Fríggjakvøldið varð skipað fyri politiskum fundi í Norðurlandahúsinum. Fundurin var søguligur, ongin fundur av hesum slag hevur verið í Føroyum áður

# Søguligur dagur fyri kvinnur

**Fríggjadagin var altjóða kvinnudagur, og hesum sambandi var politiskur kvinnufundur uppi í Norðurlandahúsinum. Allir flokkar høvdu valt kvinnuumboð fyri flokkin. Fyri summar flokkar vóru fleiri og fyri onkrar flokkar var bara ein**

FUNDUR
*Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Allar kvinnur, ið eru uppstillaðar til komandi løgtingsval, vórðu bodnar við á fundin. Teir ymsu flokkarnir kundu so velja, hvussu nógvar kvinnur tær valdu at seta upp á røðarapallin. Tíðin var knøpp. Tveir minuttir til hvønn røðara.

Fundurin varð býttur upp á tann hátt, at hvør flokkur fekk tríggjar ferðir fimm minuttir. Hvussu valt varð at býta tíðina upp, var so upp til hvønn einstakan flokk. Ímillum hvørja rundu, fingu valevnini høvi at seta hvørjum øðrum fyrispurningar, og eisini kundu fyrispurningar koma úr salinum – tó var hetta seinna ikki nógv brúkt.

Heitið á fundinum var "Hvat siga kvinnur um framtíð Føroya", og sjálvur fundurin var eisini søguligur. Hetta er fyrstu ferð, at kvinnulig valevni úr øllum valdømum hava havt møguleika at koma til orðanna.

Javnaðarflokkurin hevði átta umboð við á fundinum. Tosað varð um umhvørvispolitikk, ríkisrættarligustøðu Føroya, samfelagsskipan, leiklutin hjá kvinnuni í oljuvinnu og so framvegis.

Joan Ziskason er eitt av valevnunum hjá Javnaðarflokkinum. Hon sigur, at Javnaðarflokkurin er vælnøgdur við fundin, tó var ikki rættiliga gjørligt at fara so gjølla ígjøgnum alt, tá tíðin er so stutt, men samanumtikið var hon væl nøgd.

Fólkaflokkurin hevði sjey umboð við, og viðgjørdi hann alt frá sjálvstýri til teir bleytu pakkarnar. – Ofta verður sagt, at kvinnur bara hava áhuga fyri teimum bleytu økjunum, og hava ikki áhuga fyri undirsjóvartunlum, men eg má siga, at tá tú hevur verið við í politikki í eina tíð, so fært tú áhuga fyri øllum, eisini tí, sum í byrjanini kundi tykjast eitt sindur tungt, sigur Rúna Sivertsen úr Fólkaflokkinum.

– Fundurin var ógvuliga væl fyriskipaður, og tað eiga fyrireikararnir rós fyri. Men hesin politiski fundurin var ikki øðrvísi enn nakar annar politiskur fundur, men mannfólkini vóru ógvuliga illa umboðað. Ikki meira enn eini fimm mannfólk vóru at hóma í salinum. Kanska júst tað øvugta av tá aðrir politiskir fundir eru, tá konufólkini eru fá.

Rúna Sivertsen leggur dent á, at tað er tørvur á kvinnum í politikki, men bæði mannfólk og konufólk eiga at vera við.

Tjóðveldisflokkurin varð umboðaður av seks kvinnum. Á skránni hjá Tjóðveldisflokkinum er millum annað einar sjálvstøðugar Føroyar, sum á altjóða leikpalli er á jøvnum føti við aðrar tjóðir. Ein sjálvberandi føroyskur búskapur, sum er óheftur av donskum ríkisstuðli, eitt sjálvberandi føroyskt vinnulív, sum verður meira kappingarført og meira fjølbroytt. Eisini varð nomið við at samfelagið eigur at hava fleiri vælferðartænastur, sum til dømis pensjón og barnaansing. Hetta eigur at vera ein rættur, og ikki ein gáva frá tí almenna. Tjóðveldisflokkurin vil eisini hava, at barna- og ungdómspolitikkurin verður raðfestur hægri, og tað sama er við mentanarmálum.

Samanumtikið ljóðar, at fundurin fall í góða jørð. Nógvar kvinnur vóru møttar upp í Norðurlandahúsinum, so áhugin fyri politikki millum kvinnur, er ikki heilt lítil. Hvussu verður, og hvussu nógvar kvinnur verða valdar á ting, fáa vit at síggja til løgtingsvalið um ikki so heilt langa tíð.